# TILTØK

## BRÚDLEYP

Í dag, 1. november giftast í Elsted kirkju Annika Winther úr Havn og Karsten Klit úr Nørresundby.
Adr.: Solbærhaven 131, DK-8520 Lystrup, Danmark.

Í dag, 1. november giftast í Samuelskirkjuni í Keypmannahavn Joan P. Danielsen og Signar Johannessen, Hoyvík.

Leygardagin 6. desember kl. 14.00 giftast í Býráðssalinum í Klaksvík, Martha Justesen, Norðdepli og Andrias Hammer, Eiði. Veitslan verður hildin í Skúlanum á Fossánesi kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 318709, 423081 ella 452074 áðrenn 23. nov.

## GULLBRÚDLEYP

Fríggjadagin 14. november hava Daisy og John Joensen á Frælsinum 12, Tórshavn verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Pálsstovu fríggjakvøldið 14. nov. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 312687 ella 456305 áðrenn 1. november.

## SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 24. november hava Maria og Trygvi Samuelsen í Kollafirði verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 29. november kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Hósvík. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. nov. á tlf. 421468 ella 228624.

## 75 ÁR

Alla halgannadag, 1. november, fyllir Marna N. Joensen á Eiði 75 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

## 85 ÁR

Leygardagin 8. november verður Gunleyg Poulsen á Skipanesi 85 ár. Dagurin verður hildin í Elim í Søldarfirði frá kl. 13.00-17.00.

## 85 ÁR

Sunnudagin 2. november fyllir Distan Haraldsen, Sørvágur 80 ár. Føðingardagurin verður hildin 1. november í Svanga 34, Tórshavn.

Mánadagin 3. november verður Astrid Vørðhamar, Fuglafjørður, 85 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 01.11. Gøta tlf. 44 10 86
Sunnudagin 02.11. Eiði tlf. 42 30 06

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

### Gudstænastur
***Alla halganna dag leygardagin 1. november***
*Havnar kirkja:* kl. 20, Meinhard Bjartalíð, minningargudstænasta teirra sjólátnu
*Christianskirkjan:* kl. 20, Hans Eiler Hammer, minningardagur teirra sjólátnu.
*Gjógv:* kl. 14 Minningarhald,
*Eiði:* kl. 15.30 Minningarhald Emil Olsen
*Tvøroyrar kirkja:* Minningarhald teirra sjólátnu verður í kirkjuni kl. 13.30. Aftaná verður farið út á minnisvarðan, har kransar verða lagdir

### Sunnudagin 2. november Alla Halganna sunnudag
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk. Allahalganna sunnudag gongur talvan, fyri Føroyska Einkjugrunnin, í øllum kirkjunum í Suðurstreymoyar Eystara prestagjaldi
*Argir:* kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 12.15, altarg., Heri Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Einkjugrunnin
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Hestur:* kl. 14, altarg., Bergur D. Joensen
*Vestmanna:* kl. 12, Inga Poulsen Dam. Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
*Skála:* kl. 11,
*Sjóvar kirkja:* kl. 12.10, Jógvan Fríðriksson
*Miðvágur:* kl. 12, altarg., David Johannesen. 2. november verður farið í kirkju kl. 12 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø
*Leirvík:* kl. 12, Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Norðskála:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa (minningarhald),
*Funningur:* kl. 17 messa (minningarhald), Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Einkjugrunnin
*Vágur:* kl. 15, minningarhald, Patrick de Neergaard. Aftaná verður farið vestur til minnisvarðan, har kransur verður lagdur
*Gøta:* kl. 12, Martin R. Jacobsen. Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Gjógv:* kl. 12, minningarhald, Emil Olsen
*Tvøroyri:* kl. 11, familju- og barnagudstænasta
*Øravík:* kl. 17 altarg., Jónsvein Bech. Á Tvøroyri og í Øravík gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Árnafjørður:* kl. 12, altarg.,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen. Talvan gongur fyri Hjálpargrunnin
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð. Talvan gongur fyri einkjugrunnin
*Húsavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen

*Talvan gongur í Norðstreymoyar prestagjaldi fyri Einkjugrunnin.*

### Samkoman Rhema
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 17 verður familjumøti, Símin Jacobsen talar á møtinum. Eisini verður kaffi.
Mikukvøldið kl. 20 Samkomufundur. www.rhema.fo

### Meinigheitin í Hoyvík,
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Magnus Simonsen, evni: dópur, kl. 14 Sunnudagsskúli.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudag kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 smáskótar og stórir skótar.
Týsdagin kl. 17 og 20 Hornvenjing.

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og møti har Eyðun Eltør talar. Kl. 16 verður samkoma fyri foreldrum, sum hava fingið børn seinasta árið. Ein og hvør er hjartaliga vælkomin at vera við.
Sunnukvøldið kl. 21 Bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
Mánakvøldið kl. 19 Ungdómstiltak, sum verður annaðhvørt mánakvøld í vetrarhálvuni og er ætlað ungdómi (5.-10. flokk). www.hebron.fo

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA.
Samfelagsmøtini verða í døgunum 5.-9. november.
Mikukvøldið kl. 20 Byrja samfelagsmøtini við bønarmøti.

### Lívdin
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti og tilbiðjunarmøti kl. 12, luttøka verður av Ebenezerkórinum á báðum møtunum. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli er kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bíbiltími, undirvíst verður um Opinberingina.
Heimasíðan www.livdin.fo

### Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur, kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, filmur um gøtubørnini í Kiev, innsavnan til Ytrimissión, kl. 18 Møti v/ Høgna Poulsen, Meinigheitskórið syngur.

### Filadelfia
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 Møti v/ Hjørdis Petersen, evni: Harrin grøðir.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Pater Wolf Schmidt í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
2. nov. Møti v/ Regin Høgnesen.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Hera Tróndheim lærara. Evni: Lina Sandell.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Saron, Vestmanna
Leygardagin kl. 15-17 Bíbilseminar v/ Sam Jacobsen, evni: Visión og málsetningur, kaffisteðgur kl. 16.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Jón Miðberg.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

### Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við kollfirðingum við talu og sangi.

### Meinigheitshúsið, Sandavágur
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara.

### Norðskála kirkja
Kirkju- og missiónsvikan byrjar í morgin – Alla halganna sunnudag – við skriftamáli kl. 11.40, messu kl. 12 og heldur fram alla vikuna við gudstænastum og møtum. Mánakvøldið verður katekismusgudstænasta kl. 20. Evni: Luther og Skriftin.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Frits Thomsen á Skála talar. Streingjakórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gøta
Mánadagin 3. nov. kl. 20 Glyvra-Hanusarshús, bíbliutími v/ Peter O. K. Olofson: Forsoningen.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Tit mega ikki ræðast! Tí at eg veit, at tað er eftir Jesusi, hinum krossfesta, tit leita. Hann er ikki her, tí hann er risin upp, sum hann hevur sagt. Komið higar og síggið staðin, har sum Harrin lá!«*

*Matt. 28, 5-6*

Páskir á heysti, eitur onkur sunnudagur hesa ársins tíð. Prædikuteksturin ber boð um hetta.

Páskamorgun. Tá ið glíggjaði fyri degi, hoyrdist veingjasuð í urtagarði Jósefs. Nú skuldi undrið henda. Hin stóri, tungi steinurin, sum hevur avbyrt vegin til lívsins land, skuldi veltast burtur. Frammanfyri hesum steini hevði ætt eftir ætt steðga í vónloysi og avmakt. Ræðsla og myrkur hevði fylt teirra tilveru. Kerúbar við glampandi logasvørði høvdu vart atgongdina til Paradís.

Men nú var páskamorgun…vegurin til himmals var latin upp aftur. Hin síðsti stóri steinurin, sum stongdi fyri grøvini, skuldi burtur. Ei undur í at jørðin skalv tá ið hetta undrið hendi.

Og so hoyrdist: Jesus livir!

Har hin stóri, tungi steinurin áður hevði ligið, spratt vónarinnar páskalilja fram.

Jesus livir!

Hann, ið doyði á krossinum, livir. Guð hevur prógvað, at offurgerð Jesu, er fullgott offur. Tað er fullgjørt! Alt! Deyðin – eisini hesin seinasti fíggindi – er sligin. Myrkrið hevur fullkomuliga tapt.

Jesus er veruliga risin upp! Grøvin er tóm. Heldur ikki likaminum orkaði deyðin at halda føstum. Var Jesus ikki likamliga risin upp, so hevði deyðin havt eitt sindur eftir. Men nú er grøvin tóm. Sigur hins upprisna er fullkomin.

Jesus livir – og hann livir fyri teg. Hann megnar at lyfta allar steinar, sum steingja vegin til himmals fyri tær. Og hann, ið hevur hetta vald og hesa megi, er nær hjá tær. Við lið tína stendur hann og sigur: Óttast ikki, eg eri tín endurloysari. Gev teg trygt yvir í mínar hendur. Einki er ov tungt og trupult fyri meg! Amen!

**John S. Myllhamar**

# TILTØK

### Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara. Evni Gud er kærleiki, Gud er heilagur. Innsamling til húsið. Drekka verður aftaná møti.

### Elim í Søldafirði
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 luttaka Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Aglow møti í Runavík
Aglow møti verður í Hæddini í Runavík leygardagin kl. 15. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

### Lívsins Orð, Saltangará
Sunnudagin kl. 17 verður Evangel. møti.
Tim 5 verður mánadagin kl. 17.30 og Ungdómsmøti kl. 20.

### Keldan, Skálafirði
Sunnudagin kl. 17 Møti, ungdómur skipar fyri. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

### Tabor, Toftir
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Evni verður: »Barnadópur« við Thomas Dam. Húsið verður opið til kl. 24. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Thabor, Fuglafjørður
Opið hús verður leygarkvøldið kl. 21.

Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30 og møti kl. 18.

### Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, filmur um gøtubørnini í Kiev verður vístur, og kl. 18 Møti við Jórun Malaikev, greitt verður frá arbeiðinum millum gøtubørnini í Kiev. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Leirvík
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 v/ Kristian á Reynatrøð. Barnaansing verður.
Ungdómsmøti kl. 21 v/ Regin Høgnesen.

### Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

### Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20, Thomina Svøðstein vitnar. Filmur verður vístur, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti.

### KFUM & K í Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Niels Paula Danielsen, kl. 21 Ungdómsmøti. www.kuff.fo

### Missiónshúsið á Viðareiði
Sjómanskvinnuringurin á Veiðareiði og Hvannasundi koma saman í Missiónshúsinum á Viðareiði hóskvøldið 6. nov. kl. 19.30. Sjómanstrúboðarin Torleif Johannesen verður við. Mint verður á jólapakkarnar.

### Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønar- og lovsongsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-6. fl. kl. 19 samlast ungdómurin frá 7. fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

### Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Poli Jacobsen talar, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

### Sands missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, evni: »Símun eg havi nakað at siga tær«. Tú er hjartaliga vælkomin.

### Frá samkomum í Suðuroynni
Evangelisk møtirøð verður í TB-húsinum frá 31. okt. til 2. november. Hvørt kvøld kl. 20.

### Café One Way, Tvøroyri
Dynamis bíbliuskúlin verður leygardagin 1. nov. kl. 10-12 og kl. 13-15. Tilmelding á tlf. 222694.

Alpha-skeið verður mánakvøldið 3. nov. kl. 18.30. Øll eru vælkomin.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Vegna møtini í TB-húsinum verður onki ungdómsmøti hetta vikuskiftið.
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin (barnagudstænasta verður kl. 11). Einki møti verður sunnukvøldið vegna møtirøð í TB-húsinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Vági
Fríggjakvøldið kl. 19.30 verður skipað fyri einum undirvísingarkvøldi, har Mads Noer frá felagsskapinum »Agape«, innan donsku heimamissiónina, kemur at undirvísa í evnunum »Trúarlív og kenslulív« og »Tvístøður, hvussu loysa ella liva við teimum«. Høvi verður at seta spurningar og til samtalu. Innsavnan verður.

### Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

### Betel, Vágur
Leygardagin kl. 20 Ungdómsfundur.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, talari: Svenning av Lofti.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

### Frelsunarherurin, Vágur
Broytingar vegna møtirøð í TB-húsinum: Fríggja- og leygarkvøldið ongir bíbliutímar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17 Evangel. møti har Eyðun Christiansen talar.
Týskvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

### Bygdarhúsið í Lopra
Møti verður sunnukvøldið kl. 20 Svenning av Lofti talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Tilhaldið
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 3. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Vit hugsa um jólini
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
*Týsdagin 4. november*
kl. 10-12.00 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja – Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Jórunn »forvitnast frá« Fridu hvussu tað var at vera barn í Havn í 1930 og 1940
*Mikudagin 5. november*
kl. 10-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 15.00 Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 6. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát
*Fríggjadagin 7. november*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Hourlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir. Tilm. mánadag, tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

### Pensionistafelagið í Havn
Vit koma saman hvørt mikukvøld kl. 19 til ymisk spøl og hugna. Einaferð um mánaðin hava vit bingo og tá byrja vit kl. 18. Øll m/k sum eru 60 ár kunnu gerast limir, annars er aldurin fyri fyritíðarpensionistar og avlamispensionistar 55 ár.

### Sunda Pensionistafelag
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrabakka mánakvøldið 3. nov. kl. 19. Kingobólkurin úr Tjørnuvík luttekur.

